# Ph.D. verja á Fróðskaparsetrinum

Ph.D.-ritgerð góðkend til verju á Fróðskaparsetri Føroya

Mánadagin 2. apríl 2007 fer Bárður A. Niclasen, cand.scient. at verja Ph.D.-ritgerðina "Operative wave model for the Faroe Shelf" við Fróðskaparsetur Føroya.

Í dómsnevndini hava sitið Dr. Judith Wolf, granskari við Proudman Oceanographic Laboratory, Liverpool, Dr. Jaak Monbaliu, professari við Department of Civil Engineering, Katholieka Universiteit Leuven og Bogi Hansen, Ph.D., adjungeraður professari á Fróðskaparsetrinum og granskari á Fiskirannsóknarstovuni.

Sjálv verjan, sum er almenn, fer fram í høllini á Føroya Sjómansskúla. Byrjað verður stundisliga klokkan 15.00.

Ritgerðin "Operative wave model for the Faroe Shelf" liggur alment frammi á Landsbókasavninum.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
100 Tórshavn
Tel. 352500
**www.setur.fo**

TEAM85



## Byggifrøðingur

Søkt verður eftir byggifrøðingi til Húsaumsitingina hjá Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðsøki**

- at vera við í arbeiðinum at umsita kommunalar bygningar
- at skráseta bygningar
- at gera útbjóðingartilfar í samband við umvælingar og viðlíkahald av bygningum
- at hava eftirlit við arbeiðum
- at luttaka í ymsum arbeiði á deildini

**Førleikakrøv**

- tú skalt hava útbúgving sum byggifrøðingur, og tað er ein fyrimunur, um tú ert lærdur húsasmiður
- royndir við tekning í AutoCad, útbjóðing og eftirliti við arbeiðnum
- førleika á brúkarastøði í niðanfyri nevndu forritum
- tú skalt hava koyrikort

Húsaumsitingin brúkar telduforritið Caretaker til skráseting av kommunalum bygningum, og kemur í framtíðini eisini at brúka skipanina til viðlíkahaldsarbeiði. Harumframt verður arbeitt við Word, Excel, MS Projekt, AutoCad, Microstation og Navision.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast møguligt eftir sáttmála millum Føroya Byggifrøðingafelag og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fulltíðarstarv.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt ella Harald Bjørgvin, leiðara fyri Húsaumsitingina, tlf. 302010.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi seinasta lagið fríggjadagin 30. mars 2007. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

## Børn við mál og talutrupulleikum

Talupedagogisk viðgerð til børn - og kunning og vegleiðing til foreldrini.

v/privat. prak. talupedagogi,
Lisbeth Gotved Petersen, audiologopædur,
cand. phil.

Ringið 52 17 02 millum kl. 16-18 ella sms'a og eg ringi aftur.

*taluvidgerd@kallnet.fo*



## Húsavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir einum húsavørði til Dagstovnin við Botnánna og Millum Bóla í Kollafirði og Dagstovnin í Kaldbak. Talan er um eitt fastlønt starv.

**Arbeiðsøki**

- røkja bygningarnar og økið uttanum
- gera smærri umvælingar
- røkja el-, vatn-, hita- og sanitetviðurskiftini
- hava bruna- og trygdarútbúnað í lagi

**Vit rokna við at tú**

- hevur handverkaraútbúgving sum húsasmiður ella líknandi.
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir
- hevur koyrikort

Kommunan skipar fyri skeiðum í viðlíkahaldi av bygningum.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og fíggjarmálaráðið.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til leiðaran fyri Húsaumsitingini, Harald Bjørgvin, 302010 .

**Umsókn**

saman við tilmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. mars 2007. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

## *Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800